gult cyan magenta svart

FØÐINGAR

20. feb. fingu Kára Joensen og Idar Lydersen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

21. feb. fingu Guðrið Mohr Hansen og Søren Bisgaard Olesen, Vejle, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

21. feb. fingu Maria Jacobsen, Viðareiði og Gert Norðoy Jensen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3800 gr.

22. feb. fingu Anni og Janus Sørensen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4855 gr.

22. feb. fingu Mohsen-Darvishi og Pernille Mittún, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3550 gr.

22. feb. fingu Edna Jacobsen og Jógvan Sámalson Jacobsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3450 gr.

22. feb. fingu Erna og Asbjørn Østerø, Eiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

23. feb. fingu Ulla og Brynleif Askildsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 60 cm. long og vigaði 4900 gr.

24. feb. fingu Hanna Mikkelsen og Hans Nielsen, Argir, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

24. feb. fingu Annika Jacobsen og Poul Kjartan Poulsen, Sandvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4010 gr.

25. feb. fingu Rannvá Sólheim Hansen og Egon Joensen, Århus, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3440 gr.

25. feb. fingu Anna og Kristian á Reynatrøð, Leirvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

26. febrúar fingu Henrietta og Svenning Poulsen, Sandur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3675 gr.

26. februar fingu Conny Lauritsen og Jofred Hansen, Miðvágur, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3200 gr.

27. feb. fingu Liljan og Regin Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4000 gr.

27. feb. fingu Beinta Dahl-Olsen og Ólavur Jógvansson Durhuus, Argir, eina son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3900 gr.

1. mars fingu Elsa og Torkil Dam, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

ANDLÁT

22. februar:
Maria Christiansen, Skála, 95 ár

23. februar:
Birita Persdóttir Hansen, Glyvrar, 28 ár
Hans Hendrik Hansen, Elduvík, 79 ár
Malena Johannesen, ættað úr Leirvík, 92 ár

24. februar:
Marius Absalonsen, Vágur, 90 ár

25. februar:
Mortina Petersen, Tvøroyri, 87 ár

27. februar:
Anne-Lena Krogh, fødd Petersen, Fuglafirði, 65 ár

TILTØK

Gudstænastur
1. sunnudagur í føstu
Glyvrar: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
Hósvík: kl. 12, altarg., Marjun B æk
Vestmanna: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Kvívík: kl. 12, Hans J. Joensen, biskupur
Kvívík: kl. 17 føstugudstænasta, urguleikari: Meinhard Bjartalíð
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein
Nólsoy: kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
Fríðrikskirkjan: kl. 11, deyvagudstænasta, altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Deyvameinigheitina
Viðareiði: kl. 12, altarg., Elsa Funding
Norðskála: kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Aftaná gudstænastuna kirkjukaffi
Bøur: kl. 12, altarg., *Sandavágur:* kl. 18, David Johannesen
Hellur: kl. 19, Jónsvein Bech
Sjóvar kirkja: kl. 12, *Funningsfjørður:* kl. 19, *Elduvík:* kl. 20.15, Jógvan Fríðriksson
Tvøroyri: Petur M. Rasmussen
Argir: kl. 11, Uni Næs
Á Leiti: kl. 12, Erland Beder
Vesturkirkjan: kl. 11, *Kirkjubøur:* kl. 12.30, altarg., Bergur D. Joensen
Christianskirkjan: kl. 11, (útvarpsgudstænasta) Niels Pauli Danielsen
Árnafjørður: kl. 11, *Kunoy:* kl. 12.15, Hans Eiler Hammer
Svínoy: kl. 12, Heri Joensen

Glyvra kirkja: kl. 20.30, Musik – Andakt, Meinhard Bjartalíð.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 familjumøti v/ Minna og Evy, kl. 18 kvøldmøti, Ólavur Jacobsen talar, Liquid Gravity luttekur við sangi og vitnisburði.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin. Týskvøldið kl. 20 Ítriv til frama fyri missión.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið í Havn
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18
Ytrimissiónsmøti v/Herluf Heinesen, barnaansing er meðan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiði v/Alfred Petersen. Evni: Sátan og øll vera hans.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Eivind og Margareth Frøen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Eiriki og Jórun Skála, Argjavegur 21. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Leygardagin kl. 16.30 í KFUK: Felagskvøld fyri KFUM og KFUK fyri fólk í øllum aldri.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, við Sonju Klein presti. Evni: Mósubøkurnar.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Adventdkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Forbøn: Dániel, kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin Tórshavn
Fríggjadagin kl. 19.30 Kvinnubønardagur í Adventskirkjuni.
Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjáland talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Finngerð Djurhuus Olsen talar.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior, kl. 18 møti.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Týskvøldið kl. 20 venur Argjakórið – nýggir limir eru vælkomnir.
Mikumorgun kl. 07 bønarløta.
Hóskvøldið kl. 20 Føstugangsgudstænasta. Møguleiki er at hoyra talur frá møtum á heimasíðu okkara: www.koma.fo
Argjalegan verður 16.-18. mars. Tekning á tlf. 312292 ella 314699 áðrenn 13. mars.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 familjumøti.
Mánadagin kl. 20.30 hittast ungu hjúnini hjá Erling og Hjørdis, Argjavegur 49A.

»Tíð til Gud«
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Talari hesaferð verður Tom Rasmussen: Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18, luttaka á møti í bygdarhúsinum í Tjørnuvík. Mánadagin kl. 20 bíbliutímin og bøn.

Filadelfia, Sundalagi
Í morgin kl. 18 kvøldmøti. Týsdagin frá kl. 18-19 bønarmøti.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli. Einki møti sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hósvík.
Sunnukvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Bárur Kass Nielsen og Jón Eikhólm. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 møti við Hjørdis og Dánjal Petersen, barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Áttanda boð: Tú mást ikki bera rangan vitnisburð ímóti næsta tínum.

Tað er ikki bara í rættarmálum, at rangur vitnisburður ikki má berast fram, men so sanniliga eisini í tí dagliga gerandislívinum. Vit kundu sagt tað stutt: tú mást ikki lúgva ella: tú mást ikki siga ósatt. Vit koma longst við at halda okkum til sannleikan. Tað liggur kanska til okkum at fara lætt um sannleika, um vit halda okkum fáa fyrimun av tí, og eisini um tað gongur út yvir onnur menniskju.

Vit koma lætt at skaða umdømið hjá næsta okkara, um vit bera leysatíðindi víðari, sum einki hald er í. Gitingar og illgitingar føra til slatur og sleyg, sum skjótt fara víða um og gera sína oyðileggjandi og niðurbrótandi ávirkan galdandi.

Mítt land hevur fostrað eitt ravnaslag, fegnast tað flýgur um nætur, kvøðir mæta skald okkara. Man tað vera eitt lyndiseykenni hjá okkum at fara so illa við hvørjum øðrum, sum skaldið her sigur, og sum helst hevur kent sviðan av hesum á egnan kropp: Eg kenni ljótt gorrandi ravnaslag…, tað er ormeitrað níðingaslat ur. Hørð orð frá einum vitugum manni til eina kristna tjóð.

Tey kristnu eyðkennini áttu heldur at sett meira dám á okkara dagliga atburð og orðaval í samskifti okkara við hvønn annan. Tað trýtur ikki leiðbeining í so máta í okkara bíbliu. Talið ikki ilt hvør um annan, brøður! Tann, ið talar ilt um bróður sín ella dømir bróðir sín, talar ilt um lógina og dømir lógina. So varðveit tína tungu frá illum, og varrar tínar frá fals at tala.

At vera við tí góða orðinum er ein dygd, sum vit eiga at fjálga um og taka til okkara. Vit eiga heldur at umbera, enn at skuldseta, heldur dylja veikleikar hjá øðrum, enn bera tey upp á mál, heldur leggja gott í orð og gerðir næstans, enn leggja hann undir illar ætlanir.

Hvar enn tú hittir næsta tín minst til, hvat orðið sigur: tú honum hjálparsemi sýn, sjálvt um hann ei teg biður.

Til góða gerð
tú skjótur ver.
Veit hjáp og ráð,
tú finnur tá,
í hjartanum kenst friður.

Meistari, hvat gott skal eg gera, at eg kann fáa ævigt lív? Jesus segði: Vilt tú koma inn til lívið, tá halt boðini. (Matt. 19,16-17).

Sigvald Kristiansen

TILTØK

Bíbliuskeiðrøðin
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í høgum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará v/ Jón Joensen, Strendur.
Húsmøti verður í Saltangará týsdagin kl. 19 hjá Anthony og Charles. Verið hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við BKU-nevndini. Hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Signar og Sólgerð á Reynatrøð. Lovsongsbólkur luttekur. Aftaná verður kaffi og samvera. Innsavnan til húsið.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

EB-húsið á Eiði
Evangeliskt møti í EB-húsinum á Eiði leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19 við Tórmund, Jaspur og fleiri.

Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður ungdómsmøti við Hans Jákup og Jyttu av Argjum.
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/Mejnhardt og Judith Hansen, har tey greiða frá tænastuni í Ísrael. Øll eru vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin 4. kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 16.30 ALPHA skeið (11-15 ár) kl. 18.00 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skálavík
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Samvirkinum í Porkeri. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jóannes Mortensen, Porkeri. Innsavnan til húsið.
Missiónsvikan byrjar týskvøldið 6. mars kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 14. mars hava hjúnini Lydia og Henning Pedersen, Ishøj, silvurbrúdleyp. Lydia er ættað úr Vági og Henning er fyrrverandi yvirkonstápul úr Mjørkadali. Opið hús er tann dagin í heiminum.
Adr.: Landlyst Vænge 70, 2635 Ishøj.

PRÓGV

Annika F. Berg hevur tikið prógv sum matvøruverkfrøðingur frá Danmarks Tekniske Universitet.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 3 mars: Knud Jakobsen, tlf. 423006
Sunnud. 4. mars: Andreas Petersen, tlf. 441086

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin í Vági
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sigrid Ludvig og Eydnu Bech.
Mánakvøldið kl. 20 heimafordundið.

Frá Felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn. Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð Foldbo tlf. 422184.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

VBA-fundir
Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkymlandi familjuviðurskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur).
Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 12.3.
kl. 9.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmeld. til døgurðan og túrin mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 6.3.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað
Mikudagin 7.3.
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag 316491)
kl. 15 Túrur út á Tinganes. Frásøgufólk Gudrun Haustein og Maiken Poulsen
Hósdagin 8.3.
kl. 10.30-11 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd
Fríggjadagin 9.3.
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Pensionistafelagið í Havn
Í føstuni møtast vit hvørt hóskvøld kl. 19 í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Hevur tú fylt 60 ár, er tú vælkomin at gerast limur.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupost-ur lisa@lisa.fo – heima-síða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22.
Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adr.: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiski-menn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Nor-egi. Lima-gjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Ís-landsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovu-tíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Rand-fríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin geran-disdagar kl. 8.30-16.00.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupost-adr. deaf_fo@-post.-olivant.fo

Føroysk gudstænasta
verður sunnudagin 4. mars kl. 14 í Hafnarfjarðar kirkju við altargangi. Eftir gudstænastuna verður kaffi í savningarheiminum Strandberg, sum hoyrir til kirkjuna. Emil Olsen prestur prædikar.

Nærvarpið LUMI radio í Ålborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýrin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sending-in frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
E-mail:
eliaskirkjan@get2net.dk
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Føroysku gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnu-morgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fund-ur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið.
Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

gult cyan magenta svart